ítróttur

Nr. 191 • fríggjadagur • 7. oktober 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Vandu seg við hitan

**Fyrsta venjinginhjá fótbóltslandsliðnum í Ísrael var á skránni mikudagin, har tað einamest ráddi um at venja spælararnar við nógvu hitastigini**

LANDSLIÐIÐ
*Jákup Mørk*

**Tel Aviv, Ísrael:** Fyrireikingarnar til seinasta landsdystin í hesi undankappingini er farnar ígongd.

Og hóskandi kundi verðið lagt afturat, at talan er um seinasta landsdystin við Henrik Larsen á odda fyri føroyska liðnum.

Mikudagin seinnapartin hevði liðið sínar fyrstu venjingar, og fyrst og fremst mundi endamálið í hesum vera, at fáa gongd í vøddarnar eftir drúgva týsdagin, sum mest sum út í eitt varð nýttur til ferðing. Soleiðis fingu spælararnir loyvi at sova til klokkan 13, soleiðis at ringasta møðin varð beind burtur.

Áhugin fyri føroysku venjingini var tó stórur, og fleiri ísraels tíðindalið frá bæði loftmiðlum og teimum skrivaðu fylgdu við, meðan Henrik og Jógvan Martin koyrdu á spælararnar.

- Hatta er júst tær somu venjingarnar, sum Richard Møller Nielsen plagdi at hava við okkara monnum, helt onkur av tíðindamonnunum, sum tó kortini ikki undraðist á hetta. Tí teir vóru eisini vitandi um ,at stóri Henrik var ein av týdningarmestu brikkunum, tá Danmark við Møller vann EM-heitið í 1992.

Um hetta varð ment rætta ella skeiva vegin, er ilt at meta um, men undir øllum umstøðum, so gjørdist talan ikki um ta drúgvu venjingina mikudagin. Spælararnir skulu eisini venja seg við tey 30 hitastigini, sum eru um dagin, og tó at tað sjálvsagt gjørdist nakað svalligari, tá sólin setti um hálvgum sjey tíðina, so vóru hitastigini framveigs fleiri og tjúgu í tali.

Úr einum føroyskum sjónarhorni var tó hugaligt at staðfesta, at allir spælarar tóktust vera væl fyri. Eingir skaðar tykjast gera um seg, og sum heild er lagið í hópinum eisini gott.



*Fróði Benjaminsen og Símun Samuelsen undir fyr stu venjingini í Tel Aviv*

**Til søguliga staðin**

Ikki minst tykjast fleiri av spælarunum eisini at vera sera spentir til hósdagin, har eisini annað enn venjing er á skránni. Seinnapartin verður soleiðis farið við bussi til Jerusalem, sum søguliga man teljast millum mest áhugaverdu býirnar yvirhøvur.

Men hóast stóru upplivingina, sum soleiðis liggur og bíðar, so er tó eingin ivi um, hvat fremsta málið við ferðini er. Enn ein av stóru landsliðsuppgávunum stendur fyri framman. Og sum seinasta uppgávan hjá venjaranum tykist hendan eisini at vera serlig fyri spælararnar. Teir vilja í øllum førum gera sítt til, at talan gerst um eitt vakurt farvæl, og so er spurningurin, hvørt teir megna hetta móti ísraelsku yvirmaktini, sum leygardagin fer á vøllin her í Tel Aviv.

# Tekur ferðina sum uppliving

**Bergur Midjord sigur seg ikki hava tær stóru vónirnar um eitt pláss á vøllinum hesaferð. Men skuldi møguleikin komið, so er hann til reiðar at taka av**

DEBUTANTUR
*Jákup Mørk*

**Tel Aviv, Ísrael:** Nýggjasti maðurin í landsliðsleguni tóktist stórtrívast, nú hann slapp at royna seg saman við toppinum av føroyskum fótbólti.

Í øllum førum helt Bergur Midjord, at talan var um eina heilt øðrvísi uppgávu enn tí vanligu, nú hann vandi við A-landsliðnum.

- Tað er so heilt sikkurt. Tú kemur at kenna fleiri nýggjar spælarar, og sum heild má eg eisini siga, at støðið er nakað hægri á venjingunum. Ferðin í venjingunum verður jú betri, betri spælararnir eru, og í so máta er hetta eisini ein avbjóðing. Og sum heild er upplivingin jú heilt øðrvísi, helt hann.



*Feskasti føroyski landsliðsspælarin tóktist trívast væl saman við restini av hópinum, tá venjing var á skránni*
±

Ikki minst helt Bergur, at tað kravdi nakað av tilvenjing, tá spælast skal í so nógvum hita.

- Tað ræður um at drekka nógv, og fáa nógva hvíld alla tíðina. Skulu vit vera væl fyri, so mugu vit eisini fyrireika okkum á best møguligan hátt, og tað fáa vit eisini loyvi til.

**Hevur ikki lisið uppá**

Bara tað at sleppa við á fyrstu landsliðsferð sína, er sjálvandi stór uppliving hjá Bergi. Men hann tóktist so heldur ikki hava nakað ímóti, at leiðin á hesari skuldi ganga til Ísrael.

- Tað er deiligt. Veðrið er jú framúr her niðri, og sum uppliving er tað eisini stórt, so hetta var bara heilt super.

Og í morgin (hósdagin, blðm.) er so ein sightseeing ferð til Jerusalem. Hevur tú lisið uppá, hvat tað er, sum tit tá skulu hyggja eftir?

- Nei, als ikki. Men tað verður sjálvandi eisini ein spennandi ferð, helt hann.

Tá tosið fall inn á sjálvan dystin, helt Bergur, at hann sum so ikki hevur gjørt sær teir stóru tankarnar um, hvørt hann sleppur inn á vøllin ella ikki.

- Hetta er jú fyrsta ferðin, at eg eri við, so í fyrstu atløgu taki eg hetta bara sum eina góða uppliving. Eg havi sum so ikki gjørt mær tær stóru vónirnar um at sleppa inn á vøllin, men tað vildi sjálvandi verið stuttligt, um so varð, segði hann at enda.

